# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI MOLAN

SB_Tórshavn_Molin_2022_2_X

Við heimild í løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir frá 21. mai 1954, verða skipaðar hesar reglur fyri tað øki í Tórshavnar kommunu, ið nevnt er í 1. grein.

## §1. ØKI SAMTYKTARINNAR

Stk. 1. Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali 1, matr. nr. 600a, 600c og 600d, Tórshavn, og allar jarðarlutir, sum eftir góðkenning av hesi byggisamtykt verða frábýttir nevndu ogn.

Stk. 2. Økið verður býtt sundur í eindirnar A og B, samsvarandi kortskjali 2.

## §2. ENDAMÁL OG HEIMILD

Stk. 1. Endamálið við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa havnavirksemi á økinum, samsvarandi kortskjali 2.

Stk. 2. Økið liggur í B1 øki, sum sambært almennu byggisamtyktini skal brúkast til endamál, ið hava við beinleiðis havnarakstur at gera, skrivstovur, goymslur o.t.

Stk. 3. Sambært kap. IV, § 8, stk. 7 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu er ásett fyri B1 øki, at í serstakari byggisamtykt kann, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, víkjast frá ásetingum um mest loyvdu hædd.

Stk. 4. Fyri viðurskifti, sum ikki eru reguleraði í hesi serstøku byggisamtykt, eru ásetingarnar í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu galdandi.

## §3. NÝTSLA ØKISINS OG ÁSETINGAR Í ØKJUNUM

Stk. 1. Øki A

1. Økið verður lagt til farm, bíðirekkir og parkering.
2. Loyvt verður einans at byggja smærri bygningar til rakstur og tænastuvirskemi, ið hevur samband við havnaraksturin.

Stk. 2. Øki B

1. Økið verður lagt til ferðafólkaterminal, skrivstovur og goymslur í samband við skipaferðslu og vøruflutning. Avmarkað øki av tekjuni skal vera til almenna nýtslu.
2. Mest loyvda hædd á í mesta lagi 50% av økinum er 18 m. Mest loyvda hædd á restini av bygninginum er 12 m. Sí prinsipp skurð á skjali 3. Tó kann undantak gevast, tá talan er um kranar og einstakar bygningslutir, t.d. trapputorn.

3. Útsjóndin á bygninginum skal vera í trá við byggingina, ið sýnd er á viðhefta skjali 4.

## §4. VEGIR OG PARKERING

Stk. 1. Vegir og parkeringspláss skulu gerast sambært ásetingum í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

## §5. ÚTSJÓND HÚSANNA

Stk. 1. Øll bygging í økinum, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, skal gerast í samráð við byggifulltrúan.

Stk. 2. Kommunan skilar sær rætt til at seta krøv til útsjónd av bygningum í sambandi við út- og umbygging ella nýbygging.

## §6. BYGGINMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

Stk. 1. Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## §7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR Í HENNI

Stk. 1. Smávegis frávik frá reglunum í hesi byggisamtykt kann býráðið geva loyvi til, um so er, at dámur á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk,

Stk. 2. Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Molan | | | | |
| **Undirheiti** | 1 | | | | |
| **Mát** | 1:2.000 | | | | |
| **Dagur** | 30.06.2022 | **Journal** | 20/01023 | **Tekna** | RVH |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Molan | | | | |
| **Undirheiti** | 2 | | | | |
| **Mát** | 1:1.500 | | | | |
| **Dagur** | 30.06.2022 | **Journal** | 20/01023 | **Tekna** | RVH |




**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Molan | | | | |
| **Undirheiti** | 3 | | | | |
| **Mát** | | | | | |
| **Dagur** | 30.06.2022 | **Journal** | 20/01023 | **Tekna** | |



**Tórshavnar Kommuna**
**Býarskipanardeildin**

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| **Heiti** | Serstøk byggisamtykt fyri Molan | | | | |
| **Undirheiti** | 4 | | | | |
| **Mát** | | | | | |
| **Dagur** | 30.06.2022 | **Journal** | 20/01023 | **Tekna** | |